kronikkur

# Saddam: Deyðadøm

## Kronikkur

Bogi Eliasen
bogi@sosialurin.fo

**Saddam Hussein varð hongdur leygarmorgunin 30. desember, eftir eitt rumblut rættarmál. Filmurin av løtuni, tá ið hann bleiv tikin av døgum, og sjálvt rættarmálið, vísir eitt Irak, sum livir í andanum ið Saddam skapti, sigur Tonny Brems Knudsen, serfrøðingur í altjóða politikki í viðtali við Sosialin**

Í 1989-90 rapaði eysturblokkurin og gjøgnumskygni og frælsi vunnu bardagan um heimin. Sum í einum ævintýraheimi sigraði tað góða ímóti tí ónda, tað ljósa ímóti tí myrka, tað opna ímóti tí afturlatna. Heimurin var ein heild, og tvíbýtið hvarv. Soleiðis var støðumyndin, tá eysturblokkurin rapaði. Eysturevropisku og fyrrverandi Sovjetlondini hildu eisini, at nú var broyting komin í, og um fá ár var alt ein liberalur dansur á rósum, liberalisman hevði vunnið Kalda kríggið. Vit minnast ikki Kalda kríggi fyri nakað gott, men at heimsins lond antin vóru við eystur ella vestur, og at í flestu orrustum var annar parturin stuðlaður av eystur og hin av vestur. Hetta er kanska ein ógvuliga svørt/hvít mynd, men soleiðis var.

### Kuwait ovboðið

Skiftistíðin til heimsliberalismu var tó ikki bara sum at siga tað. Heimurin var ikki fastlæstur í stoltleikanum hjá tveimum superveldum longur, og tí komu eisini aðrar orrustur, onnur mál og aðrar tvístøður á dagsskrá. Saddam Hussein hevði verið maðurin hjá vestri – og serliga USA - í Miðeystri. Hóast tey, sum vildu vita tað, vistu, at hann var ein harðrendur og eirindaleysur einaræðisharri, so var stuðulin til hansara, partvís ein stuðul fyri at tryggja, at Iran ikki gjørdist sterkari. Men Saddam fór um mark, tá hann helt seg hava rættin til at innlima Kuwait í Irak, og eftir tað var hann ikki vinmaður hjá vesturheiminum.

### Fyri ella ímóti, aftur

Fyrsta Flógvakríggið, ið fór fram við ST-samtykt, var grundað á irakisku innrásina á Kuwait. Tá Irak fall, kundi t.d. USA, sum var høvuðshermegin í innrásini farið eftir Saddam og koyrt Baath stýrið frá, men hetta varð ikki gjørt. Irak bleiv sett í eina støðu, har altjóða tiltøk vóru sett í verk til tess at noyða landið og Saddam at broyta landið til tað betra. Hetta spælið koyrdi fram til Annað Flógvakríggið, tá Krígssamgongan við USA á odda og uttan ST heimild gjørdi innrás í Irak. M.a. tí landið var ein hóttan ímóti heimsfriðinum við hópoyðingarvápnum, tí at USA hevði skýrt Irak, saman við Iran og Norðurkorea at verða axis of evil, og ikki minst at Irak hevði samband við Al-Qaeda, og tí stóð fyri skotum næst eftir Afghanistan í alheims krígnum ímóti yvirgangi. Eitt kríggj, har Bush setti heiminum knívin á barkan og segði, at antin eru tit við ella eru tit ímóti. Svart/hvíta myndin átti aftur dagsskránna.

### Skeivar grundgevingar

Slagið um Irak var ikki so hart og hópoyðingarvápn hevði hann heldur ikki. Saddam hataði helst Al-Qaeda eins nógv og USA hatar Al-Qaeda, umframt at Al-Qaeda ikke helt nógv um Saddam, so tað



*Hvør standmynd kemur ístaðin*

sambandið var tað helst heldur ikki so nógv um.

Eftir stendur heimurin við eini innrás, sum frá byrjan var bygd á skeivar upplýsingar, og sum hevur sett trúvirðið í at hava ein altjóða rætt í vanda. Innrásin fylgdi heilt einfalt ikki teimum krøvum altjóða rættur setur fyri at heimild skal verða fyri einari slíkari og m.a. tí var henda innrás heldur ikki gjørd við ST hemild.

### Irak knúst

Í dag ber so til at staðfesta at innrásin hevur elvt til ragnarok og hevur syndrað landið Irak. Irak var ikki stuttligasta landið at búgva í við Saddam sum leiðara, men har er nógv verri nú. Tað er eyðsæð, at innrásin ikki var nóg væl tilrættarløgd. Og tað er eyðsæð, at alt ov lítið hevur verið hugsað um hvat skuldi koma aftaná Saddam. Øll við bara eitt sindur av vitan um Irak vistu, at talan ikki var um eitt náttúrligt land við einari tjóð, men eitt samansett land, har fyrrverandi hjálandaveldini høvdu sett landamørkini. At kurdar, sunniar og shiitar gjørdu, at vandin fyri borgarkríggi var stórur, umframt annan skilna í landinum.

Hóast hesa vitan verður avgjørt at fara inn og rættiliga einsæris at stuðla shiitunum við at seta sunniar frá valdinum og shiitar á tað ístaðin. Kurdarnir hava í

Sosialurin